## Laksaútflytarar útihýstir

Tíggju norskir laksaútflytarar eru komnir á svartalista hjá ES, eftir at kanningar hava avdúkað, at fyritøkurnar hava brotið regluna um minstaprísin á norskum laksi til ES-marknaðin.

Kanningarnar hava prógvað, at norsku útflytararnir seldu laksin fyri minni enn 3,25 evrur fyri kilo, sum er tann ásetti prísurin, og at fyritøkurnar dumpaðu prísin í fleiri tíðarskeiðum í fjør.

Avdúkingarnar bera í sær, at ES hevur sagt upp prísavtaluna við teir tíggju norsku laksútflytararnar. Tað merkir, at skulu fyritøkurnar selja ES laks, skulu tær rinda 14 prosent í revsitolli.

## SPD frammanfyri

Fyri fyrstu ferð síðani í januar fáa sosialdemokratarnir í Týsklandi størri undirtøku frá veljarunum enn teir kristiligu demokratarnir.

Ein kanning, sum sjónvarpið ARD hevur gjørt, gevur sosialdemokratunum hjá Gerhardi Schrøder, kanslara 39 prosent av atkvøðunum, var val nú. Teir kristiligu demokratarnir hjá kanslaravalevninum Edmundi Stoiber fáa eftir kanningini 38 prosent. Sama kanning gevur Teimum Grønu 7,5 prosent og Fríu Demokratunum 8,5 prosent.

Í kanningum fyri einum mánað síðani fingu teir kristiligu demokratarnir sjey prosent meiri enn sosialdemokratarnir. Valið í Týsklandi verður 22. september.

## Krevja endurgjald

Avvarðandi hjá teimum fýra fronsku fiskimonnunum, sum doyðu, tá norska tangaskipið "Bow Eagle" sigldi trolara teirra niður, krevja nú endurgjald frá norska reiðaríinum.

Mánadagin varð skipað fyri minningarhaldi í býnum Les Sables-d'Olonne, og tá hittu umboð fyri tey avvarðandi Bjørn Sjaastad, sum er stjóri í reiðaríinum Odfjell.

Sakførarin hjá teimum avvarðandi sigur, at tey fara at krevja endurgjald, men hann dugir ikki at siga, hvussu stórt endurgjaldskravið verður. Vanlukkan hendi tann 26. august úti fyri Bretagne-strondini. Tað hevur serliga vakt ans, at norska skipið rýmdi av staðnum, sjálvt um teir, sum høvdu vakt, vistu, hvat var hent.

## Spenningur í Írlandi

Nógv bendir á, at fólkaatkvøðan í Írlandi um Nice-sáttmálan verður ógvuliga spennandi.

Ein nýggj kanning vísir, at heili 44 prosent hava framvegis ikki gjørt av, um tey fara at atkvøða fyri sáttmálanum, ella um tey fara at atkvøða ímóti. 29 prosent siga, at tey fara at atkvøða ja, og 19 prosent siga, at teirra svar verður nei.

Enn er ikki avgjørt, nær fólkaatkvøðan verður, men ætlandi verður hon um mánaðarskiftið oktober-november. Tá írar fyrru ferð atkvøddu um Nice-sáttmálan, vóru 54 prosent ímóti honum, men tá vóru bara 35 prosent á vali. Tað var í juni í fjør.

# Fuglberg til Grønlands

**Fuglberg kom til Klaksvík mánakvøldið av Flemish Cap. Teir brutu túrin av, tí skipið skal til Grønlands og manningin er uppsøgd**

FISKIVINNA
*Solby A. Eliasen*


*Fuglberg verður nú leigaður til Grønlands fyribils í 15 mánaðir*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

**Klaksvík:** Hanus Hansen, stjóri á JFK Trol sigur, at leigumálið ikki er endaligt enn, men ætlanin er, at Fuglberg skal leigast til Grønlands fyribils í 15 mánaðir.

- Vit hava valt at gera hetta, tí tað gongur ikki væl við rækjuveiðuni fyri tíðina og so er ein neyddur at finna upp á okkurt, tí vit kunnu ikki halda fram sum er, sigur Hanus Hansen.

Fuglberg var á rækjuveiðu á Flemish Cap. Teir høvdu verið burtur í tveir mánaðir. Ætlanin var, at teir skuldu fiska longri, men teir brutu sum sagt túrin av, tí skipið nú, um alt gongur eftir ætlan, skal til Grønlands.

Annars sigur stjórin á JFK Trol at partrolingin hjá Sjúrðarberg og Næraberg eydnaðist væl prakstiskt, men tað gav ikki nóg mikið av fiski til, at tað loysti seg at hava tvey skip.

- Júst hvat vit so gera við tað, veit eg ikki enn, men vit fara at finna upp á okkurt, sigur Hanus Hansen í stuttari samrøðu við Sosialin.

Matstovueigari í Klaksvík:

# Ætla at røkka teimum vaksnu eisini

**Michael Olsen, sum eigur og rekur grill, pizzaria og dansistað á Fornagørðum í Klaksvík, sigur, at hann hevur framt nakrar broytingar á viðurskiftini í hølunum við vón um at røkka út til tey meira vaksnu eisini**

*Solby A. Eliasen*


*Michael og Sólrun Olsen avmyndaði í teim sera hugnaligu hølunum á aðru hædd á Fornagørðum*

**Klaksvík:** Michael greiðir frá, at hóast hansara viðskiftafólk fyri tað mesta hava verið børn og ung, so var tað ikki upprunaliga ætlanin, at tað bert skuldu vera tey, sum komu á gátt á Fornagørðum.

- Men tað var tað so blivið til, og tað havi eg so roynt at broytt nú við at avmarka atgongdina til aðru hædd til vaksin, sigur hann.

Hølini, har Michael hevur sítt virksemi hýsir fleiri ymiskum. Har er grill og høli at sita og eta í á fyrstu hædd. Har halda nógv ung og børn til. Eisini er dansistaðið Barok á fyrstu hædd. Onnur hædd hevur eisini verið nógv nýtt av teim ungu, men nú hevur Michael so valt, at miða meiri í mót at geva teimum vaksnu pláss har, so tey kunna njóta eina máltíð í frið og náðum. Á aðru hædd er eisini matstovan Fortuna, sum upprunaliga var matstovan Shang – Hai.

Men fyrr í ár gjørdi Michael av, at broyta navnið til Fortuna, tí hann selur ikki kinesiskan mat longur.

Ovast í bygninginum hjá Michael er so eitt rúmligt, ljóst høli, har tey ungu hava møguleika til at spæla pool.

So ikki kann sigast annað enn, at møguleikarnir eru nógvir, um ein vitjar inni á gólvinum á Fornagørðum.

Michael sigur, at tey ungu, sum dagliga vitja inn á gólvið eru nógv í tali. Men tey hava áður kunnað hildið til í øllum trimum hæddunum í bygninginum, men tað er so broytt nú.

- Nú hava vit sett eitt etistaðið á aðru hædd í stand, soleiðis at vit kunna miða ímóti at fáa fleiri vaksin at koma út at eta. Og vónandi fer tað at eydnast.

Og hølið er sera hugnaligt. Tað hevur eitt føroyskt snið. Tað vil siga, at á veggunum eru grótlaðingar málaðar, soleiðis at tá ein hevur sett seg við eitt borð, so er tað næstan sum at sita í eini rætt. Tað er Niels í Horni, sum hevur málað. Hann hevur eisini málað teir avbera vøkru málningarnar, sum hanga á veggunum inni í hølunum.

Michael sigur, at um fólk koma inn á gólvið eitt kvøldið, so er møguleiki at fáa grill og pizza hjá teimum ungu á fyrstu hædd, meðan tað sama kann fáast á aðru hædd umframt búffar frá køkinum.

Grillin á Fornagørðum er opin allar dagar í vikuni í døgurðatímanum og seinni um kvøldið.

Michael sigur, at tað loysir seg ikki at hava matstovuna Fortunu opna mitt í viku, so tí er hon bert opin fríggjadag og leygardag.

Dansistaðið Barok er opið fríggjakvøld og leygarkvøld, men Michael hevði kunnað hugsað sær, at latið upp fyrr á kvøldi, soleiðis at tey, sum hava hug til at fara út tíðliga eitt kvøld, hava eitt stað at fara til.

- Men sum er, so koma tey ikki serliga tíðliga út, sigur Michael.

Hann er ikki einsamallur um alt virksemið hjá sær. Konan, Sólrun, hjálpir til eisini. Hon hevði eina hárfríðkanarstovu, har sum Barok er í dag. Men tað er hon farin frá nú.

- Treyðugt so, eg klippi sera nógv enn, og har aftur at havi eg eisini heilsøluna við merkinum Schwartzkopf, sum eg selji til aðrar salongir um allar Føroyar, greiðir Sólrun frá.

ítróttur

Nr. 173 • mikudagur • 11. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Lærarin, sum skelkaði Skotland

**Bæði í Skotlandi og Danmark verður nógv gjørt burturúr føroyska tvímálsskjúttanum, John Petersen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*


*FOOTBALL: GOAL HERO JOHN'S A CLASS ACT*
*»AND this, boys and girls, is where I shall be scoring THREE goals next September...«*
*Faroe Islands school-teacher turned Scotland-tamer John Petersen yesterday showed kids at the East School in Torshavn exactly where we are in the world.*
*Fortunately for two-goal hero Petersen, he didn't have FIFA's rankings to hand.*
*He'd NEVER have found Scotland on that map of footballing excellence.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ristingarnar eftir føroyska avrikið móti skotum hava enn ikki lagt seg. Sunnudagin var hetta sjálvsagt ovarliga á breddanum í nógvum miðlum, men mánadagurin tóktist ikki vera stórt øðrvísi í so máta. Tað tykist í øllum førum í Skotlandi at vera so, at her varð dagurin nýttur at finna frágreiðingar til, hví alt gekk galið á Svangaskarði.

Sambært Dailyrecord og danska Ekstra Blaðnum, sum bæði hava mest sum somu grein, er eitt av svørunum heilt einfalt, at skotska liðið var ov vánaligt.

Í báðum bløðunum verður John Petersen endurgivin fyri at siga, at hann undraðist á, hvussu gott pláss hann fekk í álopinum, eins og hann eisini var bilsin um, hvussu Berti Vogts hevði sett liðið hjá sær saman.

– Eg má viðganga, at eg var bilsin um, hvussu vánaligir skotarnir vóru í fyrra hálvleiki – serliga í verjuni. Vit høvdu í veruleikanum bert ein mann á toppinum, og kortini hevði eg nokk av plássi, tá eg skoraði bæði málini, verður hann endurgivin fyri at siga.

– Tað er mest sum ótrúligt. Báðir miðverjarnir hjá teimum spæla hóast alt í Premier League, sigur hann, og greiðir víðari frá, at hann eisini undrast á, hvussu Vogts hevði sett liðið saman:

– Verður sæð burtur frá miðverjunum og Allan Johnston, sum skoraði, tá skotar vóru her seinast, so kendi eg ongan leikara. Men eg má viðganga, at eg ikki roknaði við, at tað skuldi gerast somikið lætt at spæla ímóti teimum.

Tað er so í øllum førum tað, sum føroyski leikarin verður endurgivin fyri at siga.

### Aftur gerandisdagur

Annars verður eisini gjørt nógv burturúr, at tað var ein fólkaskúlalærari úr Føroyum, sum soleiðis skuldi taka skotar á bóli.

Eitt nú hevur fyrrverandi Rangers-áleyparin, Mark Hateley, funnist hvassliga at skotsku verjuni.

– Tað er ov galið, at eitt skotskt lið bara fær javnleik móti einum liðið, sum er sett saman av fiskarum og skúlalærarum. David Weir og Christan Dailly eru somikið royndir leikarar, at ein skúlalærari skuldi verið jarðlagdur, langt áðrenn hann somikið sum kom inn á vøllin, men kortini fær John Petersen skotið tvey mál móti teimum, og tað er snøgt sagt ikki nóg gott, sigur Hateley.

Júst orðini frá Hateley um »skúlalæraran« tykjast veruliga hava sett seg fast hjá skotsku miðlunum, og í øllum førum varð nógv gjørt burturúr, at John Petersen mánadagin hevði ein púra vanligan gerandisdag, har undirvísingin í Eysturskúlanum stóð fremst á skránni.

Í útlendsku bløðunum verður hann endurgivin fyri at siga, at talan nú aftur er um ein vanligan dag, og tó at onkur av næmingunum kanska spyr um landsliðstroyggjuna ella líknandi, so roknaði hann ikki við nøkrum stórvegis broytingum.

Dailyrecord, sum eisini var blaðið, sum prentaði greinina við Hateley, endar sína søgu um føroyska skúlalæraran við niðanfyristandandi myndini og myndatekstinum, sum vit lata vera við at umseta á hesum sinni.

